# Stór sølustevna á Sandi

**Leirdúgvuskjótin, mótasýning og nógv annað verður á skránni, nú B71 skipar fyri sølustevnu um vikuskiftið**

Sølustevnan byrjar dýra biðjudag klokkan 14, og endar hon leygardagin klokkan 19.

Fyrireikarnir hava sett sær sum mál, at hava eina fjølbroytta skrá, og sum nakað nýtt, hava teir fingið limir úr Byrsumúla at koma suður at skipa fyri Leirdúgvuskjóting.

Ætlanin var, at hava kappingina við Meginskúlan,men av ymiskum orsøkum, bar hettar ikki til, og verður kappingin tí úti í Støð.

Fastur táttur hevur eisini verið at hava køkutombola, og tað verður so eisini á skránni. Men hartil verður eisini skipað fyri køkukapping, har fimm tær vakrastu køkurnar verða kosnar og síðani seldar. Og tey, sum hava bakað ella lagt saman tær tríggjar vakrastu køkurnar, fáa steyp til ognar.

Eisini børnini fáa sítt, tá Bassi kemur á vitjan, umframt at tey eisini kunnu stuttleika sær við brotssparkskapping.

Og sum vant, so verður eisini nakað at draga lut um. Atongumerkið til stevnuna er eisini lutaseðil, og har ber til at vinna flogferðir frá báðum føroysku flogfeløgunum, umframt at onnur virki eisini hava latið vinningar.

Í sambandi við sølustevnuna siglir Teistin eykatúrar, soleiðis at tað skal vera so ómaksleyst sum gjørligt hjá fólki úr øllum landinum at koma á stevnuna.



# Várkonsert við Ljómi

Mikukvøldið klokkan 19 hevur kirkjukórið, Ljómur, stóra várkonsert. Kórið, sum verður undir leiðslu av Dorte Tilma fer tá at framføra fleiri føroyskar sálmar og vársangir, eins og verk eftir Moritz Hauptmann og Edward Elgar eisini eru á skránni.



## ÁÐRENN:

Thomas hevur sethúsalán, billán og nýtslulán. Hann umhugsar at umleggja síni lán, tí fíggingarloysnin hóskar ikki til hansara tørv og ynskir. Afturgjaldstíðin er ov stutt, avdrøgini ov høg, og rentuloysnin er ótíðarhóskandi. Hann kundi hugsað sær størri rásarúm nú og so heldur goldið meiri, tá børnini eru vorðin eldri, og inntøkan er hækkað.

**Thomas Hansen**

34 ár

Stjóri í egnari fyritøku

Giftur við Eyð

Tveir synir, 1 og 13 ár